# FØROYA KÆRUSTOVNUR

Skjal 8

Tórshavn: 13. september 2018
Málstal: 18/00184
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: AH/ge

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**

Víst verður til skriv tykkara frá 23. juli 2018, har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar.

Í § 22 í uppskotinum verður lagt upp til, at øll skrásett inntriv skulu fráboðast til tvingsilsnevndina, sum skal føra yvirlit yvir inntrivini og greina hesi árliga saman við ársfrágreiðing.

Vit loyva okkum at seta spurnartekin við, at fráboðanin skal gerast til tvingsilsnevndina, sum hevur sum uppgávu at góðkenna inntriv og virka sum kærumyndugleiki. Nevndin hevur ikki eftirlit við bútilboðum v.m. og vandi kann tí vera fyri, at hetta ivaleyst skilagóða yvirlitið bert gerst ein innsavnan av tølum við hagfrøðiligum endamáli. Um tað hinvegin var ein myndugleiki, sum hevur eftirlit við bútilboðunum v.m., sum hevur hesa uppgávu um hendi, er tað meiri nærliggjandi, at myndugleikin setir tiltøk í verk at fremja neyðugar batar á økinum. Tá hevði endamálið við at hava slíka fráboðanarskipan komi meiri til sín rætt. Fráboðanin átti tí heldur at verið gjørd til t.d. Almannamálaráðið.

Eftir uppskotinum er ætlanin at seta tvingsilsnevnd við 5 limum, tveimum løgfrøðingum, einum námsfrøðingi, einum lækna og einum sjúkrarøktarfrøðingi. Vit mæla til, at nevndin ístaðin verður mannað við trimum limum, løgfrøðingi, lækna og námsfrøðingi. Hædd er tá tikin fyri, at fakligu førleikarnir, sum verða mettir neyðugir í uppskotinum, verða varðveittir í nevndini. Samstundis er tað lættari at skipa fyri fundi fyri trý heldur enn fimm fólk og er hetta ikki óviðkomandi, tá freist á ávikavist 7 og 30 dagar er sett fyri viðgerðini og nevndin tí skal kunna savnast við stuttari freist.

At enda skal viðmerkjast, at tað sýnist ikki at framganga greitt í uppskotinum, hvussu ætlanin er at tryggja, at borgarar, sum hava rætt at kæra, verða kunnaðir um henda rætt.

Vinarliga

Føroya Kærustovnur

Anja Hovgaard, stjóri

UNDIR HORNABAKKA • POSTSMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • WWW.FKS.FO • FKS@FKS.FO